# Djurholm stuðlar Landsverk

**Hugskotið um at leggja ætlaðu undirsjóvartunlarnar í eitt alment partafelag, so vinningurin av Eysturoyartunlinum kann fíggja Sandoyartunnilin, sum Landsverk hevur skotið upp, er gott, heldur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum. Men hann vísir á, at Løgtingið hevur samtykt, at eitt privat felag sleppur at gera Skálafjarðartunnilin**



UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

At Sandoyartunnilin sambært Landsverk ikki nýtist at kosta landskassanum og harvið føroyska skattagjaldaranum eitt oyra, um ætlanin verður tengd saman við Skálafjarðar- ella Eysturoyartunlinum, kemur ikki óvart á landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm.

- Eg kenni væl hatta modellið, og tað var eisini umrøtt í viðmerkingunum til uppskotið hjá okkum um at fyrireika fast samband um Skálafjørðin, sum varð lagt fyri løgtingið í mars í fjør, sigur Bjarni Djurholm.

Spurdur hví hetta ikki bleiv til nakað, sigur Bjarni Djurholm, at um hann legði hetta fram, hevði tað ikki verið politisk undirtøka fyri tí.

- Men eg vildi ikki vera ákærdur fyri at fjala nøkrum upplýsingum, og tí varð hesin møguleiki um eina alternativa fígging umrøddur, sigur Bjarni Djurholm, sum hevði eitt ynski um at fara uppaftur longri, tá tað snýr seg um at leggja fíggingina av undirsjóvartunlunum saman.

- Stóð tað til mín, tóku við bæði Eysturoyartunnilin, Norðoyatunnilin og Vágatunnilin í einum og fíggjaðu bæði Sandoyartunnilin og ein komandi flogvøll inntøkunum frá teimum tilsamans, sigur Bjarni Djurholm vísir á, at Sandoyartunnilin valla nakrantíð kemur at geva nakað avlop.

Í løtuni eru samráðingar millum Vinnumálaráðið ug p/f Skálafjarðartunnilin um treytirnar fyri, at hetta felagið skal sleppa at gera tunnilin.

Aspektið í tí sum landsverk vísir á, er nakað vit hava havt alla tíðina. Men, sigur Bjarni Djurholm, tað var ikki politisk undirtøka fyri gera øðrvísi enn tað, sum er gjørt.



*Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, heldur, at farið átti at verið víðari enn bara at tengja Eysturoyrartunnilin og Sandoyartunnilin í eina og somu ætlan. Um Vágatunnilin og Norðoyatunnilin eisini komu uppí, so kundi hetta bæði fíggjað Sandoyartunnilin og ein komandi flogvøll. Men hesum er ikki politiskur meiriluti fyri á tingi, sigur hann*

*Savnsmynd*

- Eg vil ikki renna undan politisku ábyrgdini, men eg havi gjørt, sum tann politiski viljin vildi. Tað stutta av tí langa er, at um landið gjørdi Eysturoyartunnilin, sum verður mettur at fara at geva stóran vinning, so fingu vit tann vinningin til at brúka til aðrar íløgur, sigur Bjarni Djurholm.

Tú tekur altso undir við tilmælinum hjá Landsverk?

- Ja, tað var upprunaliga mítt tilmæli, ið fekk lutvísa undirtøku í landsstýrinum, men ikki hjá einum løgtingsmeiriluta, sigur Bjarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum vísir á, at tað framvegis verður samráðst við áhugabólkin aftanfyri skálafjarðarætlanina um treytirnar, og at landið lutvíst skal fáa ágóðan av inntøkunum frá tunnilsgjaldinum.

# Páll á Reynatúgvu ivast

**Tjóðveldistingmaðurin í Sandoynni óttast fyri, at um ætlanirnar fyri Skálafjarðartunnilin verða broyttar nú, fer hetta at ganga út yvir Sandoyartunnilin**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Tankin er áhugaverdur, men eg ikki, at tað er so ómetaliga stór uppgáva hjá landinum at fíggja Sandoyartunnilin. Hetta er fyrsta viðmerkingin hjá tjóðveldistingmanninum í Sandoynni, Páll á Reynavúgvu.



*Tingmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum í Sandoynni, Páll á Reynatúgvu, er til reiðar at viðgera Skálafjarðartunnilin og Sandoyartunnilin av nýggjum, men vil bara tryggja sær, at hetta ikki fer at seinka Sandoyartunlinum*

*Savnsmynd*

Eins og javnaðartingmaðurin í oynni, Gerhard Lognberg, óttast Páll á Reynatúgvu fyri, at tað kemur flimmur á skermin og fer at seinka einum komandi Sandoyartunli, um Skálafjarðartunnilin verður drigin uppí.

Landsverk vísir á í einum uppriti til Vinnumálaráðið, sum Sosialurin hevur fingið innlit í, at um Skálafjarðartunnilin, ella Eysturoyartunnilin, sum Landsverk nevnir hann, verður lagdur í eitt alment partafelag saman við Sandoyartunlinum, so kann fyrstnevndi fíggja síðstnevnda, har inntøkugrundarlagið er nógv minni.

- Eg haldi hetta vera ein spennandi tanka, men vil fyri alt í verðini ikki órógva tað arbeiði, sum er í gongd í sambandi við linjuføringina. Eg eri opin fyri møguleikanum, og haldi tað vera skeivt at taka Skálafjarðartunnilin fram um Sandoyartunnilin, sigur Páll á Reynatúgvu.

Hinvegin vísir sandoyartingmaðurin á, at hann heldur tað vera eitt djarvt initiativ av stigtakarunum til Skálafjarðartunnilin, men at modellið brýtur við allar slíkar ætlanir, sum higartil hava bygt á tað samhaldsfasta.

- Ber tað til at finna eina skilabetri loysn, so eri eg fyri at viðgera tann spurningin av nýggjum. Eg vil bara tryggja mær, at vit fáa Sandoyartunnilin, og at hann ikki verður seinkaður av hesum. Framtíðin hjá Sandoynni stendur og fellur við tunlinum. Bæði pendlarar og øll oyggin byggir sína framtíð á, at tunnilin kemur, sigur Páll á Reynatúgvu.